Røktar- og umlættingarheimið

**Lágargarður**

## Summarfrítíðaravloysarar til Lágargarð

Røktar- & Umlættingarheimið Lágargarður lýsir eftir summarfrítíðaravloysarum í tíðini frá 1. juni 2008 til 31. august 2008.

**Fyri røktarstarvsfólk:** Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar/hjálparar.

**Til køkin:** Økonoma ella køksassistentar við prógvi, umframt hjálparfólk.

**Til reingerð:** At vaska á eindunum og á gongsøkinum.

Frítíðaravloysarir eru tímaløntir, og lønin er sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja á tlf. 31 67 88 og spyrja eftir leiðaranum.

Skrivligar umsóknir við neyðugum prógvum skulu sendast til:

Lágargarð
Att. Meta av Fløtum, leiðari
Stoffalág 84
Postboks 1188
FO-110 Tórshavn.

**Umsóknarfreistin er 1. apríl 2008.**

## Starvsfólk til Hostel.fo / Bládýpi

Til móttøku og annað fyrifallandi arbeiði, søkja vit eftir einum fólki. Arbeiðstíðin verður uml. 20 tímar um vikuna.

*Skrivlig umsókn skal sendast til:*

HOSTEL.FO

*Dr. Jakobsensgøta 14-16*
*FO-100 Tórshavn*
*e-mail Bladypi@hostel.fo*
*Tlf. 500600*

## FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

VESTMANNA KOMMUNA

## SKRIVARI TIL VESTMANNA KOMMUNU

Søkt verður eftir skrivara til Vestmanna Kommunu at byrja 1. mai 2008 ella skjótast gjørligt. Skrivarin hevur dagligu leiðsluna av umsitingini og øllum viðurskiftum í kommununi. Talan er um eitt sera fjølbroytt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum.

**Arbeiðsuppgávur:**

- leiðari av umsitingini
- skrivari hjá bygdarráðnum og nevndum
- samskifti við myndugleikar, borgarar o.o.
- kunning, m.a. tilfar til heimasíðu
- journalisering
- fíggjarviðurskiftir
- aðrar skrivstovuuppgávur

Søkt verður eftir einum persóni við hollum fakligum førleika og royndum. Kunnleiki til almenna fyrisiting og leiðslu hevur stóran týdning eins og góð samstarvsevni. Skrivarin hevur beinleiðis tilvísing til borgarstjóran.

Lønin verður latin eftir førleika og royndum.

Í Vestmanna Kommunu starvast 3 fólk í umsitingini. Arbeiðið er sera fjølbroytt og møguleiki er fyri eftirútbúgving og skeiðum.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunu-skrivstovuna, tlf. 470110, ella Karl A. Olsen, borgarstjóra, tlf. 230114.

Umsókn við avritum av møguligum prógvum og ummælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. mars 2008.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**Postboks 91**
**FO-350 Vestmanna**

## KETTA EFTIRLÝST



**Horvin við Grønlandsvegin.**
**Er grá og hevur stuttan hala.**
**Veitst tú nakað um kettuna?**
**Ring tel: 56 78 91 ella 51 96 70**

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

Smyrilsvegur 20 · Postboks 3018
FO-110 Tórshavn · Tlf. 35 14 48

# PASS

**Passframleiðslan fyri alt landið fer fram í Danmark og er passavgreiðslutíðin umleið 2 til 3 vikur.**

**Vinaliga biðið tí um passið í góðari tíð.**

Umsókn um pass fæst á Fútaskrivstovuni, Smyrilsvegi 20, Tórshavn, á heimasíðuni www.politi.fo og á øllum politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

Umsóknin kann latast inn við at venda sær persónliga til Fútaskrivstovuna í Tórshavn ella til eina av politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

Skjøl at hava við, tá pass verður umbiðið:

Gamla passið

Dóps-, føði- ella navnaseðil og møguligt vígslubræv

Nýggja passmynd stødd 35 x 45 mm.

Passið skal gjaldast, tá tað verður umbiðið.

| | |
|---|---|
| Persónar millum 18 ár og 67 ár | kr. 400,- |
| Persónar yngri enn 18 ár | kr. 115,- |
| Persónar, sum eru fyltir 67 ár | kr. 150,-. |

Gjørt verður vart við, at eftir 1. oktober 2004 kunnu børn, sum eru undir 15 ár, ikki longur verða innskrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum, og skulu tí hava egið pass.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fútaskrivstovuna – tlf. 351448 – ella politistøðirnar.

**FØROYA LANDFÚTI**

***tann 18. februar 2008***
***Karen Marie Olesen***

## Skrivstovustarv á Føroya Barnaheimi

Á Føroya Barnaheimi er eitt ½-tíðar starv leyst til setan 01.04.2008.

Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði

Vit sóknast eftir einum starvsfólki við skrivstovuútbúgving ella líknandi og arbeiðsroyndir innan hettar økið. Viðkomandi má kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v. m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 14.03.2008.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Finnur Helmsdal, leiðara, á tlf. 312320.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn